# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Salli Sommer Frankis Lognberg, Skopun**, andaðist í heiminum sunnudagin, 81 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Anna Midjord,** ættað av Marknoyri í Vági, búsitandi í Svendborg, andaðist leygardagin, 76 ára gomul.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum, ið mintust meg og vitjaðu, sendu heilsanir, blómur og gávur, í sambandi við 70 ára føðingardagin.

Stóra tøkk til tykkum øll.

**Lisbeth L. Petersen**

### 80 ára føðingardagur

Týsdagin 24. mars verður Heinina Joensen, Sandavágur, 80 ár. Dagurin verður hildin 21. mars í Meinigheitshúsinum frá klokkan 17.

### 50 ára føðingardagur

Leygardagin 21. mars fyllir Jóngerð Midjord 50 ár. Føðingardagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldsundi frá klokkan 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gullbrúdleyp

Leygardagin 21. mars kunnu Niklas og Jensia Joensen í Kollafirði hava gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin hjá dóttrini, undir Heygnum, á Todnesi 17 frá klokkan 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gullbrúdleyp

29. apríl 2009 hava Solveig og Jens Peter Arge, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin 2. mai kl. 19.00. Um tit ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tit boða okkum frá á tlf. 313173 ella 213171 innan 20. apríl 2009.

### Prógv

Joan Smidt Skibenæs av Toftum hevur á Syddansk Universitet lokið prógv sum lækni.

### Dagurin

**17. mars. Geirtrúð**, deyð í 659. Dóttir Pippin eldra og abbasystir Karlamagnus. Fór ung í kleystrið Nivelles í Belgia og gjørdist eisini abbadissa har. Millum annað var hon verndari hjá ferðandi fólki, og við vegirnar nógvastaðni í Europu vórðu bygd sanktugeirtrúðtilhald, har tey ferðandi og tey fátækastu kundu fáa hjálp. Navnið er týskt, samansett av orðunum spjót og styrki.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

Føroya Handilsskúli:

# Fyrstu prógvini í akademiútbúgvingini




*Lærarar og nøkur av teimum sum fingu prógv, f.v.: Richard Mortensen og Jóanes N. Dalsgaard, lærarar, Anna Maria Restorff, Ása Olsen, Hergerð D. Heldarskarð og Anja Rein, sum tóku prógv í Akademiútbúgving í leiðslu, og Niels á Reynatúgvu, sum tók prógv í Akademiútbúgving í altjóða handli og marknaðarførslu. Á myndini vanta Kristina Leonsson, Bogi Olsen og Aksel Haraldsen, sum tóku prógv í Akademiútbúgving í altjóða handli og marknaðarførslu.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 13. mars var prógvhandan á Føroya Handilsskúla, har tey fyrstu, sum hava nomið sær Akademiútbúgvingina í Føroyum, fingu handað prógv.

Akademiútbúgvingin er hægri útbúgving, sum lesandi taka sum parttíðarútbúgving. Útbúgvingin er sett saman av seks modulum og tekur vanliga trý ár. Til ber at taka eina samlaða útbúgving ella at taka støk modulir. Tey, sum fingu prógv, hava tikið akademiútbúgving í altjóða handli og marknaðarførslu og í leiðslu.

Við prógvhandanina hildu Richard Mortensen og Jóanes N. Dalsgaard, lærarar og vegleiðarar á útbúgvingini, røðu. Somuleiðis helt Aina L. Knudsen, útbúgvingarleiðari, røðu.

Aina L. Knudsen sigur, at akademiútbúgvingin byrjaði í 2006, og tey hava góðar royndir av útbúgvingini, sum stórur áhugi er fyri. Seinasta árið hava nógv teknað seg til. Hetta er eitt tilboð til tey sum t.d. ynskja sær eina útbúgving innan leiðslu, meðan tey passa sítt dagliga starv. Útbúgvingin er liðilig og kann tillagast tørvinum hjá tí einstaka næminginum.

*mg*

# Rene Dif í Norðurlandahúsinum

Kendi danski plátuvendarin, sangarin og sjónleikarin Rene Dif kemur til Føroya at halda fyrilestur og workshop saman við listakvinnuni Rikke Maija í Norðurlandahúsinum leygardagin 2. og sunnudagin 3. mai 2009.

Tiltakið hevur heitið "Fordøj dit liv", og er um t.d. succes-strategi, introcoach, góð kostráð, venjing, resultatorientering og motivatión. Rene Dif hevur roynt ymiskt, og hann fortelur eisini um sítt lív, frá tí hann byrjaði sína karrieru til í dag.

"Fordøj dit liv" verður leygardagin 2. mai og sunnudagin 3. mai, báðar dagarnar frá kl. 10-16.

Prísurin er kr. 1650,- við kosti. Atgongumerki kunnu keypast hjá Wellness v/ Martin Brodersen á Áarvegi 4 í Havn, tel. 223312.

Tilmelding seinast fríggjadagin 17. apríl.



*Rene Dif og Rikke Maija*